# Sølva Ford

**Sølva er eitt kent andlit í føroyska tónleikaheiminum. Hon hevur verið virkin í fleiri ár bæði sum solistur og í bólki. Á Fjarðafestivalinum 2008 sang Sølva ein sang saman við Lynda Randle. Hetta var sera væl móttikið av áhoyrarunum. Áhugavert verður at hoyra hvat Sølva fer at borðreiða við á Fjarðafestivalinum hesaferð.**



# Bjartur Fonsdal Johannesen



Bjartur Fonsdal Johannesen man helst vera best kendur sum sangari í bólkinum Proclaim.
- - Ein framúrskarandi sangar, og eins væl tónleikari, siga fyrireikarar.
Tó kemur Bjartur einsamallur á pall hesaferð.



# Heini Lützen

Heini Lützen við tónleikarum hava verið hvørt ár á Fjarðafestivalinum og verða tey aftur hesaferð. Heini spælir alt frá stillum sálmasangi til harðan rokk.



Foto: Silje Mil

# Jan Honningdal

Nógv kennast við navnið, og hann hevur vitjað í Føroyum fleiri ferðir seinastu árini, har hann hevur framført á ymsum føroyskum samkomum.
- Vit gleða okkum til felags lovsang saman við Jan, siga fyrireikarar